

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 10 - 2011

# Føroyskar fyritøkur góðir veitarar til oljuvinnu

Tað er so ótrúliga gott, at Supply Service velur at brúka føroyskar veitarar, tá teir eins væl kundu brúkt útlendskar. Hetta ger, at føroyska vinnulívið fær tilført eina vitan, sum so aftur kann brúkast í oljuvinnuni sum heild sigur Christian Nagata, stjóri í Nemasamtakinum. Dryppar Herfyri kom spildurnýtt frálandaskip til landið, annað skipið av hesum slag hjá reiðaríinum Supply Service í Lorvík. Skrokkurin er bygdur í Turkalandi og skipið gjørt liðugt á norskari skipasmiðju. Hóast útlendingar sostætt eiga mesta partin av arbeiðinum í skipinum, so er tað kortini eisini dryppað á føroyskar fyritøkur. Ein teirra er Nema, sum fekk til uppgávu at lata alla KTútgerðina umframt eina framkomna teldustýrda manningarskipan til nýggju Saeborg. Ein teirra, sum í mong ár hevur verið við til at menna KT skipanir og veita vørur og tænastur á KT økinum til eitt nú føroyskt vinnulív er Christian Nagata, stjóri í Nema-samtakinum. Ótrúligt Tað er so ótrúligt, at Supply Service velur at brúka føroyskar veitarar, tá teir eins væl kundu brúkt útlendskar. Hetta ger, at føroyska vinnulívið fær tilført eina vitan, har vit eitt nú kunnu gera softwareloysnir til oljuvinnuna og eftir tað fara út og selja hesar skipanir til aðrar fyritøkur í hesi vinnu og fyri tað eisini aðrari vinnu. Føroyski KT stjórin heldur tað tí vera gott fyri Føroyar, at ein fyritøka sum Supply Service eisini hugsar um føroyska íkastið. Fyri eitt virki sum okkara hevur tað nógv at siga, at ein føroysk fyritøka, sum byggir skip í Noregi eisini brúkar føroyskar veitarar. Tí er boðskapurin Christian Nagata hevur til tær stóru føroysku fyritøkurnar, sum fara aðrastaðnis - Takið okkum við út í heim sum veitarar ístaðin fyri altíð at halda, at hini klára tað betri. Vit klára tað væl. Um vit ikki hjálpast at sum íslendingar hava gjørt, so fáa vit eitt føroyskt vinnulív, sum bara er í Føroyum, tí hvør sær eru vit so lítlir. Vit megna ikki at fara út um landoddarnar, um vit ikki fylgjast við onkrum, sigur hann og vísir á egnar

royndir - eitt nú fylgir Sendistovan BankNordik út um landoddarnar í kjalarvørrinum á yvirtøkuni av Amagerbanken. Tað gevur so Sendistovuni eina lopfjøl eisini. Manningarskipan Arbeiðssami og vissioneri Nemastjórin heldur, at manningarskipanin teir hava ment til Saeborg kann eisini brúkast av øllum supplyfeløgum og fyri tað eisini feløgum innan líknandi bransjur. Skipanin heldur skil á øllum starvsfólkunum umborð og tryggjar, at manningin hevur tey sertifikat og loyvi hon skal hava. Skipanin sigur so sjálv frá, tá ein persónur aftur skal á trygdarskeið ol. Harvið tryggjar skipanin, at eitt felag sum Supply Service altíð er up to date við teimum krøvum, sum verða sett skipi og manning. Christian Nagata sigur, at tað er bert hendingaferð, at tú ikki kann finna ein føroyskan veitara til vørur og tænastur at lata eitt nú oljuvinnuni og leggur aftrat - Kanska er tað lættari fyri eitt oljufelag at brúka sínar upprunaliga og heimligu veitarar, men tá er tað týdningarmikið, at feløgini vita, at vit hava mest sum allar vørur í Føroyum og kunnu eisini veita nógvar av tænastunum. Og hava vit tær ikki, so kunnu vit sum oftast skaffa tær. Spennandi tíð Christian Nagata sigur víðari, at kemur oljan henda vegin, so verður tað ein spennandi tíð fyri føroyska vinnulívið, tí tørvur fer at verða á nógvum vørum og tænastum til bæði supplyskip og vónandi eisini til tey, sum fara at bora. Og sjálvt um olja og gass ikki kemur í land í Føroyum so fara tað heilt víst at vera uppgávur eins og í Noregi, har man er millum tey fremstu at byggja supplyskip og veita vørur og tænastur til oljuvinnu sum vit í Føroyum megna at lata, uppgávur har føroyskar fyritøkur kunnu specialisera seg og gerast ein góður og tryggur veitari til komandi oljuvirksemið. KT stjórin sigur seg ikki bera ótta ikki fyri avleiðingunum av eini oljuvinnu. Heldur óttast hann fyri, at politiska skipanin ikki megnar at handfara og stýra eini slíkari vinnu, tá so nógvir pengar renna inn í samfelagið. Vit skulu taka væl ímóti oljufeløgunum, men vit mugu eisini gera alt fyri at varðveita og menna okkara fiskivinnu, sum er okkara høvuðsvinna. Oljuvinnan varir bert í eina avmarkaða tíð. Og vit mugu goyma oljupengarnar og tryggja okkum, at politikararnir ikki fáa atgond til teir. Mynd - Christian Nagata heldur røðu í Norðurlandahúsinum á móttøku fyri Saeborg. Myndatøka - oljan.fo/Jan Müller Skipamyndir - Skrokkurin bygdur í Turkalandi, skipið gjørt liðugt í Norra og loksins til Føroya, har eisini føroyskir veitarar hava sett síni góðu fingramerki á lidna verkið.